# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Dómurin ímóti teirri neyðtiknu kvinnuni er slíkt keðiligt, sum hendir í rættarverkinum - eisini í USA*

*(saudiarabiskur ráðharri)*

# Friðarráðstevnan gevur neyvan frið



Teir flestu Miðeystur-serkønu vænta sær lítið burtur úr friðarráðstevnuni í Annapolis í USA. Teir seinastu dagarnar hevur amerikanska stjórnin, sum er vertur, eisini sagt, at øll framstig eru góð stig. Umboð fyri Ísrael, palestinsku sjálvsstýrism yndugleikarnar og 16 arabisk lond er á ráðstevnuni í Annapolis. Men palestinska stjórnin er ikki umboðað, og í gjár nýttu Ismael Haniyeh, forsætisráðharri, høvi til at mótmæla ráðstevnuni. Myndin omanfyri er tikin eftir fundin í Gaza.

## Vænta umfatandi valsvik í Russlandi sunnudagin

**Leiðandi russiskir embætismenn siga, at myndugleikarnir hava givið boð um svik, sum skal tryggja flokkinum hjá forsetanum sigur á valinum sunnudagin**

Tey, sum standa fyri uppteljingini á teimum russisku valstøðunum, hava fingið boð um at skipa so fyri, at flokkurin Sameint Russland vinnur tjóðartingsvalið sunnudagin. Eisini um tað krevur, at tey svika við tølunum. Tað skrivar blaðið Moscow Times.

Blaðið sigur seg hava fingið at vita frá týðandi embætismonnum í russisku umsitingini, at allir embætismenn, læknar, lærarar og onnur í almennum starvi hava fingið boð um at velja flokkin hjá Vladimir Putin, forseta. Harumframt ertu tey biðin um at útvega flokkinum 10 veljarar í part.

Almenna valnevndin avsannar tíðindini hjá Moscow Times, og talsmenn hjá flokkinum hjá forsetanum siga, at tíðindini hava bara til endamáls at spilla forsetan og flokk hansara út.

Men blaðið stendur við sítt. Millum annað endurgevur blaðið ein professara á lærda háskúlanum í Oryl fyri at siga, at hann og felagar hansara hava fingið boð um at atkvøða fyri flokkinum hjá Putin. Tey lesandi hava fingið somu boð og hava fingið at vita, at gera tey ikki eftir boðunum, dumpa tey.

Moscow Times sigur frá einum lækna í Moskva, at á einari læknastovu har hava starvsfólkini fingið boð um at seta krossin við eitt valevni hjá flokkinum Sameint Russland. Gera tey ikki tað, fer tað almenna at steðga stuðlinum til læknastovuna, skrivar blaðið.

Í Russlandi er tað ikki loyvt at almannakunngera veljarakanningar ta seinastu vikuna undan einum vali, men kanningar í heyst hava bent á, at flokkurin hjá Vladimir Putin, forseta fer at fáa meiri enn 60 prosent av atkvøðunum sunnudagin. Andstøðupolitikarar halda uppá, at fær flokkurin so nógvar atlvøður, so er svik í skipanini.

- Hetta verður tað ringasta valið í russisku søguni, hvat sviki viðvíkir. Sameint Russland fær ikki tær atlaðu atkvøðurnar uttan umfatandi svik, sigur andstøðupolitikarin Sergej Mitrokhin við Moscow Times.

## Fer at biðja upprunafólkið um umbering

**Nývaldi avstralski forsætisráðharrin, Kevin Rudd, lovar at bøta um korini hjá landsins upprunafólki**

Í hundrað ár, frá 1869 til 1969, vórðu børn hjá avstralska uupprunafólkinum tikin frá foreldrunum og latin hvítum húskjum. Síðani ágangurin steðgaði, hevur upprunafólkið kravt eina almenna umbering frá myndugleikunum, men higartil til fánýtis.

Fráfarni konservativi forsætisráðharrin, John Howard, bleiv biðin um at geva upprunafólkinum eina tílíka umbering, men hann segði nei. Men eftirmaður hansara, Kevin Rudd, sigur, at hann fer at biðja upprunafólkið um eina almenna umbering, samstundis sum stjórn hansara fer at bøta um kom teirra.

Í Avstralia verða upprunabørnini, sum vórðu tikin frá foreldrunum og latin hvítum húskjum, umrødd sum Tað Stolna Ættarliðið.

Umleið 20 milliónir fólk búgva í Avstralia. Av teimum eru umleið 470.000 upprunafólk, men teirra gerandisdagur er merktur av stórum sosialum og heilsuligum trupulleikum.



*Kevin Rudd fer at biðja upprunafólkið um umbering fyri ágang*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Mótmæla leyslating

Stjórnirnar í Noregi og Finnlandi hava sent stjórnini í Afghanistan eitt hvassorðað mótmæli ímóti, at nakrir menn, sum søktu at norskum og finskum hermonnum, eru latnir leysir. Álopið, sum var í mai í ár, kostaði einum finskum hermanni lívið, og tríggir norskir hermenn vórðu særdir. Herfyri vórðu sjey afghanskir menn dømdir 20 ára fongsul fyri álopið, men fimm teirra eru longu latnir loeysir. Tað kunnu stjórnirnar í Oslo og Helsinki ikki góðtaka, og tí hava teir sent stjórnini hjá Hamid Karzai, forseta. eitt hvassorðað mótmæli.

### Stórt mannfall í Tjad

Fleiri hundrað uppreistrarmenn lógu eftirá í gjár, tá stjórnarherurin í Tjad leyp á eitt herfylgi hjá uppreistrarmonnunum, sum halda til á marknaleiðini millum Tjad og sudanska landspartin Darfur. Talsmaðurin hjá stjórnarherinum segði, at hermenninir tóku meiri enn 50 akfør frá uppreistrarmonnunum, og at onnur umleið 40 vórðu oyðiløgd í álopinum. Almenna sjónvarpið í Tjad visti eisini at siga, at herurin hevði tikið nógvar uppreistrarmenn til fanga.

### Ófriður í París

Aftur í gjárkvøldið vóru ógvusligir samanbrestir millum løgregluna og ungfólk í útjaðaranum á París, og sambært sjónvarpsstøðini LCI fingu minst 50 løgreglumenn skaða í bardøgunum. Tríggir teirra fingu álvarssaman skaða. Hetta var annað kvøldið á rað, at tað var ófriðarligt í forstaðnum Villier-le-Bel, eftir at ein ferðsluvanlukka sunnudagin kostaði tveimum ungum dreingjum av afrikonskum uppruna lívið. Teir báðir dreingirnir sótu á einari motorsúklu, sum stoytti saman við ein løgreglubil. Tilburðurin elvdi til ófrið longu sunnukvøldið, tá ungdómar gjørdu seg inn á løgregluna.